ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 17. mars 2010

# SÍ heimavøll á Giljanesi

**Endar tað við, at neyðugt verður við einum triðja finaludysti í aðrari ella báðum finalunum í Eik-liguni í flogbólti, fer SÍ at hava heimavøll í ítróttar-høllini á Giljanesi**




Hilmar Jan Hansen

Ongastaðni í landinum er so trongligt til flogbóltsdystir sum í Sørvági. Skúlahøllin er ikki størri enn so, at vøllurin fer við tí mesta av gólvinum, so áskoðararnir næstan standa inni á vøllinum.

Samstundis, sum hetta kann vera darvandi fyri spælið, hevur tað sjálvandi eisini sína sjarmu, og tað skerst ikki burtur, at onga aðrastaðni fæst sama intima atmosfera kring ein góðan flogbóltsdyst, tí øll hini liðini í Eik-liguni hjá bæði kvinnum og monnum spæla í ítróttarhallum, har vítt er til veggja og høgt til lofts – og tí eisini stór frástøða millum áskoðararnar og sjálvan vøllin.

At so trongligt er í Sørvági, hevur fingið fleiri at stúrt fyri, hvussu verður, um neyðugt verður við einum triðja dysti í FM-finalunum, tí bæði kvinnurnar og menninir hjá SÍ hava vunnið rætt til heimavøll, skal ein triði dystur til.

Millum annað hevði Flogbólts-sambandið sett sum krav, at 60 áskoðarar skuldu sleppa inn, og av teimum skuldi í minsta lagi helvt vera frá útiliðnum, sum eru TB hjá kvinnum og Mjølnir hjá monnum.

Við bert 30 heimaáskoðarum hevði tað sjálvandi verið tunnligt við heimastuðlinum hjá SÍ, so tí hevur felagið sjálvt loyst plásstrupul-leikan við at umbiðja sær ítróttar-høllina á Giljanesi, har ríkiligt er av plássi. Eisini er har møguleiki at leggja Teraflex-gólvið á, um høvi annars verður at brúka tað til møguligar triðju finaludystir.



**Gudrid Nolsøe úr TB skal serva í Sørvági, meðan hon mestsum stendur mitt millum áskoðararnar**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

## Tummas Óli og Jan døma

Flogbóltssambandið hevur sett Tummas Óla Mortensen og Jan Hentze sum dómarar til teir fýra FM-finaludystirnar í flogbólti, sum verða spældir á Eiði leygardagin og sunnudagin.

Leygardagin verður Tummas Óli fyrsti dómari í dystinum millum kvinnurnar hjá SÍ og TB, og Jan verður fyrsti dómari til mansdystin millum SÍ og Mjølnir. Sunnudagin býta teir um, so tá verður Jan fyrstidómari í kvinnudystinum og Tummas Óli í mansdystinum.

Leygardagin er kvinnufinalan millum SÍ og TB klokkan 14 og mansfinalan millum SÍ og Mjølnir klokkan 16, og sunnudagin er kvinnufinalan klokkan 15 og mansfinalan klokkan 17. Atgongumerki til báðar finaludagarnar fáast fyri 100 krónur.

hil

# Havnar Klubbi á odda í billard

**Føroyameistarakappingin í billard fyri lið gongur móti endanum. Havnar Klubbi hevur lagt seg á odda undan endaspurtinum í hesi vikuni**

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Oddaliðið hjá Havnar Klubba vann seinasta vikuskifti 6-2 á Tvøroyrar Billardfelag og legði harvið meistaraliðið hjá Klaksvíkar Billardfelag aftur um seg. Nú bert eitt umfar er eftir at spæla, er HK tvey stig framman fyri KBF 1. Á liðnum hjá HK eru Niels Nielsen og Jógvan Jørgensen, og hjá KBF 1 eru Hallur Joensen og Sonhard Johannessen.

Mimir liggur á einum triðjaplássi, tó einans tvey stig framman fyri Klaksvíkar Billardfelag2. Fyri Mim spæla Steinbjørn í Dali og Jan Müller, og á liðnum hjá KBF 2 eru Kristian Sune Høgnesen og Torkild Jacobsen. Aftast í kappingini er Tvøroyrar Billardfelag við Max Rasmussen og Gullok Svalbard. Seinasta vikuskifti var dystur millum Mim og TBF, har Mimir vann við 6-2.

Støðan í stigum er henda: nr. 1 Havnar Klubbi 34 stig, nr. 2 KBF 1 32 stig, nr. 3 Mimir 28 stig, nr. 4 KBF 2 26 stig og aftast TBF við 24 stigum.

Tveir dystir eru eftir at spæla. Mimir skal til Klaksvíkar at spæla móti KBF 1 og Havnar Klubbi skal til Klaksvíkar at spæla móti KBF 2.

Besti spælari í kappingini er Kristian Sune Høgnesen við einum meðaltali upp á nærum 30 eygu. Næstur honum er Hallur Joensen við umleið 22 eygum í meðal, og á triðja plássi er Steinbjørn í Dali við góðum 21 eygum í meðal.

Kappast verður eisini í 2. deild. Har er KBF nr. 1 við 14 stigum. Liðini hjá tvøramonnum og Havnar Klubba hava øll seks stig hvør og hava spælt færri dystir enn oddaliðið.



**Undan seinasta umfarinum í liðkappingini í billard er Havnar Klubbi á odda**